# Vilja hava tøknina við á barnaárum

**Faroese Telecom International og First Lego League í Føroyum skrivaðu í gjár undir sáttmála, sum tryggjar føroyskum ungdómi luttøku í komandi Lego-kappingunum**

SPONSOR-AVTALA
*Jákup Mørk*

First Lego League er ein norðurlendsk kapping millum skúlanæmingar, har tøkni og Lego-leikur skulu nýtast á kreativan hátt. Hetta verður gjørt við at uppfinna og seta saman tólmenni av ymsum slag, sum síðani kunnu nýtast til ávísar uppgávur.

Endamálið við hesum er sjálvandi at menna hugin til nýskapan hjá ungdóminum, soleiðis at hesi verða enn betur brynjað til tær avbjóðingar, sum ein alt meira tøkni-kend framtíð hevur at bjóða.

### Vilja menna barnadirvið

Tróndur Djurhuus, sum er stjóri á International-deildini hjá Føroya Tele, staðfesti á tíðindafundinum, at tiltakið við First Lego League avgjørt er í samsvari við endamálið hjá FTI.

– Vit eru sannførd um, at at ein kreativ og smidlig nýtsla av framkomnari tøkni verður ein hornasteinur í allari føroyskari vinnumenning - eisini okkara. Hetta krevur, at føroyingar longu á barnaárum fáa eina góða fatan av og ein tokka og eldhuga til náttúruvísindi.

– Tað er heldur eingin ivi um, at tess meira vit varðveita av teimum skapanarevnum og tí dirvi, sum børn eiga. Tess lættari frinna vit føroyingar júst tær røkurnar, har vit kunnu gera mun í alheims høpi. Tí fegnast Faroese Telecom International um, at vit nú ahva fingið First Lego Legue í Føroyum.

Faroese Telecom International (FT International) er tann parturin av samtakinum, sum hevur ábyrgdina av at menna virksemið uttanlands við rakstri, íløgum og útflutningi.

### Somu hornasteinar

Í Føroyum er tað Kurt Madsen, sum hevur tikið stig til First Lego League, og hann var sera fegin um, at átakið nú hevur fingið ein høvuðsstuðul. Hetta ger fíggjarligu karmarnar betri, nú ætlanin er, at føroyskir næmingar á hvørjum ári skulu takast við javnaldrar úr øðrum Norðanlondum. Ein kapping, har Føroyar enn eru at rokna sum novisur, men við góðari hjálp frá NORA-felagsskapinum, bar tó til at hava trý føroysk lið við til seinastu kapping.

– First Lego Leage er eitt opið tiltak, har vit leita upp upplýsingar og samstarva á altjóða stigi eins væl og lokalt. Kreativitetur, loysnir, nýhugsan og samstarv tvørtur um mørk eru hornasteinar í hesum átaki, sum eisini røkkur tvørtur um faklig, alds-, kyns- og landafrøðilig mørk. Tí byggir hetta í stóran mun á somu grundhugsjónir, sum FT International, og vit vænta okkum tí eitt samstarv, sum kann verða báðum pørtum at gagni, staðfesti Kurt Madsen, tá sáttmálin varð undirskrivaður.

Sáttmálin millum partarnar er galdandi í trý ár, soleiðis at føroyska luttøkan til FLL er tryggjað til og við 2008.



*Umframt undirskrivingina av sáttmálanum, kundu næmingarnir eisini sýna nakað av tí, sum føroysku luttakararnir høvdu verið við til at ment undan fyrstu kappingini*
*Mynd: Finnur Justinussen*

Sosialurin
www.sosialurin.fo

## VIÐMERKINGAR

# Skálafjarðartunnilin – avleiddar verkætlanir

REGIN JACOBSEN
Býráðslimur í Runavíkar kommunu



**– Taka vit skjótasta veg úr Gøtudali til Havnar, so er tað sjálvandi beint suðureftir. Tí undrar tað,a t Landsverk mælir til at gera ein tunnil í ein vestan fyri síðani at koyra norðureftir, sigur Regin Jacobsen m. a.**

Í tilmæli sínum »Eysturoyartunnilin og avleiddar verkætlanir«, mælir Landsverk til, at verandi farleið millum Gøturnar og Skálafjørðin verður broytt.

Tveir møguleikar verða nevndir fyri eini nýggjari leið, (1) ein tunnil frá rundkoyringini í Gøtudali til Ánirnar sunnan fyri Skálabotn og (2) ein nýggjur vegur frá rundkoyringini í Gøtudali oman fyri Gøtugjógv og Syðrugøtu um Gøtueiði.

Í tilmæli sínum leggur Landsverk dent á, at ein av høvuðsfortreytunum, sum atlit eiga at verða tikin til, tá nýggjar farleiðir verða gjørdar er, at »tíðin tað tekur at koma frá A til B« er eitt mát fyri góðskuna/dygdina á ferðini. Hyggur tú á Føroyakortið, so kemur tú skjótt eftir, at um farast skal úr Gøtudali til Havnar, so er skjótasta farleið at fara í ein beinan sunnan, tá kemur tú nevniliga beint til Havnar.

Tá Gøtudalur verður nýtt sum knútapunkt, so er tað júst tí, at hetta er knútapunktið, sum einir 8.000 borgarar norðan fyri Gøtueiði hava fyri at koma suðuryvir. Tá Tórshavn verður nýtt í hinum endanum, so er tað tí, at hagar er nógv tann størsta ferðslan, og tað er sjálvandi eisini hagani, at størsta ferðslan er norðureftir.

Tí undrar tað, at Landsverk í hesum førinum mælir til at gera ein tunnil úr Gøtudali í ein beinan vestan, fyri síðani tá komið verður út at koyra norðureftir.

Taka vit skjótasta veg úr Gøtudali til Havnar, so er tað sjálvandi beint suðureftir. Verður ein tunnil lagdur beint suðureftir (nr. 3 á myndini) við nøkulunda somu longd, sum tann sum Landsverk mælir til (nr. 1), so kemur hesin út aftur við rundkoyringina í Søldarfirði, sum eisini er nýggj – gjørd nýliga fyri nógvar mió kr.

Vegastrekkið oman fyri Søldarfjørð og oman fyri Runavík frá rundkoyringini í Søldarfirði er einans 7 km og skal hesin liggja beint oman fyri bygt øki (mynd 3).

Mynd 2 vísir farleiðina úr Gøtudali við tunli vestur eftir til Skálafjørðin, haðani norð um Skálafjørð og síðani suðureftir vestaru síðu á Skálafjørðinum. Landsverk nevnir í tilmæli sínum, at henda vegalongd er uml. 4 km longri enn leiðin á eystursíðuni á Skálafjørðinum. Harafturat nevnir Landsverk, at neyðugt er at føra henda landsvegin gjøgnum bygdina Strendur, tí gjørligt er ikki at leggja linjuna annarleiðis. Sagt verður, at hetta vegastrekkið má fáa neyðugar ábøtur, so ferðslan verður til so lítlan ampa, sum gjørligt.

Mynd 3 vísir skjótastu farleið úr Gøtudali til Suðurstreym, nevniliga ein tunnil til rundkoyringina í Søldarfirði, og haðani ein vegur oman fyri Søldarfjørð, Glyvrar og Runavík.

Í hesum førinum ber til at koyra eftir 80 km vegi uttan fyri alt bygt øki líka úr Gøtudali til Havnar. Fyrimunirnir við hesi loysn eru sostatt bæði tað, sum Landsverk nevnir sum høvuðsfortreyt fyri eini góðari vegaføring og tað, sum Ráðið fyri Ferðslutrygd arbeiðir fyri nevniliga, at landsvegirnar ikki ganga gjøgnum bygt øki.

Hugsa vit um tryggastu, stytstu og bestu fíggjarligu loysnina, so er undrunarvert, at Landsverk ikki kemur til ta loysnina, sum er stytst, gongur gjøgnum óbygt øki, har størsta vinnuliga virksemið er og harvið gevur føroyska samfelagnum størst møguliga nytta av verkætlanini við minni dálking og tryggasta ferðslu kervinum.

Nú verður tað Løgtingið, sum skal gera av um tunnilsfelagið við kommununum við Skálafjørðin og Kaupthing, skulu fáa loyvi at gera ein tunnil tvørturum Skálafjørðin og ein frá Runavík til Suðurstreym.

*regin@bakkafrost.com*




*Tríggir møguleikar fyri farleið úr Gøtudali til Skálafjørðin*




*22 km úr Gøtudali til Suðurstreym*




*18 km úr Gøtudali til Suðurstreym gjøgnum óbygt øki*